# Monodi framførir Bach og Mendelssohn





Fyrstu vikuna í august verður tónleikur hjá J.S. Bach og Felix Mendelssohn at hoyra í Miðvági, á Toftum og í Havn. Fólkini í Monodi eru Anne Mette Greve Klemensen, sopran, Stamen Stanchev orgul og klaver og Kári Bæk, obo. Harumframt luttekur Arina Bischoff, sum syngur duet saman við Anne Mette. Monodi hevur valt at framføra tónleik hjá hesum báðum tónaskøldunum, tí tað í ár eru liðin 200 ár, síðani Mendelssohn varð føddur, og tí at hann var tann, ið gjørdi J.S. Bach, hvørs tónleikur fyrst í 1800 talinum næstan ikki var spældur longur, kendan aftur við at framføra Matteus-Passiónina umleið 80 ár eftir deyða Bachs. Monodi hevur ætlan um, umframt konsertirnar í Føroyum, at framføra somu skrá í Keypmannahavn, har Anne Mette býr, í Gøteborg har Kári býr og í Tana í norður Noregi har Stamen arbeiðir sum kantor. Á skránni til konsertirnar í Føroyum eru millum annað Orgulsonata nr 4 op.65 og aria úr oratorinum Elias eftir Mendelssohn, tríggjar ariur úr ymsikum kantatum hjá Bach við obo og orgulfylgisspæli.

# Rimmar kórframførsla um vikuskiftið

**Sunnukvøldið klokkan 19 fer TenSing at hátíðarhalda 10 ára føðingardagin við einum braki av einari konsert í Norðurlandahúsinum**

TÓNLEIKUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*TenSing kórið hevur vant dúgliga í seinastuni, nú fleiri av sangarunum ikki hava verið partur av kórinum í nøkur ár. Sunnukvøldið eru tey tó øll savnað aftur*
*Mynd: Beinta Haraldsen*

Seinastu 10 árini hava óteljandi ung sungið, dansað, spælt sjónleik og havt tað stuttligt í hjartanum í Havnini. Flestu havnafólk hava hoyrt um TenSing-kórið í KFUM, sum hevur sett síni spennandi spor á ungdómslívið í høvuðsstaðnum. Kórið, sum er fyri allar tannáringar, hevur verið karmur um eitt skapandi og mennandi umhvørvi, har listin skapar samanhald gjøgnum sang, dans og sjónleik.

Kórið sá dagsins ljós í 1999, tá ungi norðmaðurin Vemund Svendsen kom til Føroya at byrja eitt øðrvísi ungdómskór. Hugsjónin handan TenSing er, at øll kunnu vera við.

Nógv er hent síðan. TenSing kórið hevur vitjað í Kekkia, Noreg og Danmark, og fyri at fíggja hetta hava tey eisini troytt alternativar møguleikar. Eitt nú vóru tey tey fyrstu, sum høvdu eina fløskuinnsavnan.

Nú 10 ár eru liðin, síðani kórið sá dagsins ljós, verður rimmar konsert hildin í Norðurlandahúsinum. Á konsertini verður kórið mannað av sangarum, sum í størri og minni hava verið partur av kórinum seinastu 10 árini, so talan er um stóran hóp av sangarum, sum fara at framføra.

# Føroysk list á Bornholm

**Form.in er heitið á føroyska partinum av norðurlendskari framsýning í Halse á Bornholm**

LIST
*Tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*




*Skapandi føroysk list er við á framsýning, sum um vikuskiftið letur upp á Bornholm*

Leygardagin 1. august letur upp ein forvitnislig framsýning í Grønbechs Gård í Halse á Bornholm. Hetta er ein felags norðurlendsk framsýning av listahandverki, sum kallast "Nordlys". Grønbechs Gård, eisini nevnt "Bornholms Center for Kunsthåndværk", er í einum gomlum keypmansgarði, bygdur í 1800-talinum. Her eru bæði bornholmskar, danskar og altjóða framsýningar at síggja alt árið.

Seks føroyskir listahandverkarar fara at sýna fram saman við listahandverkarum úr hinum Norðurlondunum. Hendan framsýningin er ein liður í einum samstarvi, sum Norðurlandahúsið í Føroyum hevur við Bornholm og Gotland. Fyrst í november fer føroyska og Gotlendska framsýningin víðari til Gotlands. Fyrr í ár sýndu bornholmskir listahandverkarar fram í Norðurlandahúsinum.

### FORM.IN

Tann føroyski parturin av framsýningini hevur fingið navnið FORM.IN. Um hendan partin siga listafólkini: "Tilfarið er upphavið. Uttan málforðan ella málføri tosa vit saman gjøgnum tilfarið og ígjøgnum tilfarið við umheimin.

Í tí sálarliga rúminum, ið myndar FORM.IN lýta vit aftureftir, inn í okkum sjálvi og út í framtíðina. Framsýningin flytur mørk og víðkar tað vanligu fatanina av hvat list, handverk og andverk kann vera.

Í einum heimi, ið er fullur av lutum, hevur kreativa skapanin av einum formi ein serligan leiklut.

FORM.IN sýnir eitt umboðandi úrval av føroyskum listahandverki."

### Listafólkini

Føroysku listafólkini, ið eru við á framsýningini, eru Astrid Andreasen, sum arbeiðir við tekstil, Jógvan Biskopstø, sum arbeiðir við træi og metali, Oggi Lamhauge, við pappíri, Ole Jakob Nielsen, við træ, Guðrið Poulsen, við keramik og Tita Vinther við tekstil. Hesi eru øll viðurkend listafólk, sum hava havt nógvar framsýningar bæði her heima og uttanlands.

## Vónirnar til Eik lækkaðar 156 milliónir

IFS, sum fyri fáum vikum síðani væntaði yvirskot hjá Eik Banka, hevur í nýggjastu greining síni lækka vónirnar um úrslitið við 156 milliónum. IFS hevur gjørt avtalu við Virðisbrævamarknað Føroya um at greina tær fýra føroysku fyritøkurnar, sum í løtuni eru listaðar á VMF.

Millum hesar er Eik, sum í farnu viku kunngjørdi ein hálvársroknskap, sum sýndi eitt munandi størri hall enn tað, sum IFS hevði mett.

Í viðmerking til hálvársroknskapin sigur IFS, at orsøkin til skeivu metingina fyrst og fremst eru øktar avsetingar. Serliga í Danmark, har Eik millum annað hevur sett 40 milliónir av ímóti tapi upp á EBH-grunnin.

IFS metir, at tað er serliga trupult at meta um vandan fyri avsetingum hjá Eik í Danmark.

Í seinastu greiningini av Eik metti IFS, at ársúrslitið hjá bankanum fór at liggja um tær 56 milliónirnar í yvirskoti. Nú sigur metingin eitt hall upp 100 milliónir krónur, og er hetta nakað verri enn tað, sum bankaleiðslan segði seg meta, tá roknskapurin varð lagdur fram. Tá varð sagt, at roknað verður við einum tapi, sum verður millum 25 og 75 milliónir krónur.

**-mørk**